FM-vónin livir enn

Vinnur STÍF í Runavík, og VÍF fær fulla úrtøku ímóti Stjørnuni, so tekur STÍF eitt risastig ímóti bronsuheiðursmerkjunum.

HONDBÓLTUR
Páll Holm Johannesen

Kvinnurnar í Vestmanna hava framvegis møguleikan at endurvinna FM-heitið, men so krevst, at VB-kvinnurnar snáva í næstu dystunum. Í kvøld fær VÍF vitjan av Stjørnuni, og skal trýstið á VB varðveitast, er kravið ein sigur á klakskvíkskvinnum í Vestmanna í kvøld.

Bæði liðini vunnu sínar dystir um vikuskiftið. VÍF grundaði sín sigur í fyrra hálvleiki ímóti Neistanum, og fekk eisini høvi til at hvíla nakrar av stuðulsleikarunum í seinna hálvleiki til dystin í kvøld.

Stjørnan hevur havt eitt misjavnt endaspæl, har spælið hevur verið rættiliga svingandi, so ilt er at meta frammanundan, um liðið fer at megna at gera nakað við favorittarnar úr Vestmanna. Stjørnan vann á Kyndli um vikuskiftið, og er framvegis eitt av boðunum til bronsuna.

Í hinum dystinum í kvinnudeildini fær botnliðið Tjaldur vitjan av STÍF.

Sóley Mikkelsen og hinar kvinnurnar á VÍF-liðnum hava framvegis møguleika at vinna FM, og skal lítla vónin varðveitast, skulu tær vinna á Stjørnuni í kvøld.

Tað er longu greitt, at Tjaldur endar á aftasta plássi, og sjálvar siga kvinnurnar úr Runavík at hugurin at spæla hondbólt er ikki hin besti í løtuni. STÍF er tí greiður favorittur undan dystinum. STÍF liggur í løtuni best fyri í kappingini um bronsuheiðursmerkini, og við einum sigri í kvøld liggja STÍF enn betri fyrr - ikki minst um VÍF fær fulla úrtøku ímóti Stjørnuni.

Báðir dystirnir hjá kvinnunum byrja klokkan 18.30

Menninir spæla eisini

Tveir dystir vera í bestu mansdeildini í kvøld. Tjaldur og STÍF bresta saman, meðan kollfirðingar møta Kyndli í høllini í Hoyvík. STÍF liggur í løtuni best fyri í kappingini um FM-heitið, og er stórfavorittur undan dystinum í høllini í Runavík.

Tjaldur endar eisini aftast í 1.deild hjá monnum, og runavíkingar hava tí lítið at spæla fyri, tað ið eftir er av kappingini. Einmansherðurin Dragisa Stojovic helt Tjaldri inni í dystinum ímóti VÍF seinasta mikudag, men eftir, at hann varð mansvardur, høvdu Tjaldur lítið at vísa.

Í Hoyvíkshøllini tekur KÍF ímóti Kyndli. Kyndil hevur verið besta liðið í endaspælinum, og teir liggja framvegis framvið, um oddaliðini STÍF og VÍF skuldu snáva.

Hóast Kyndil hevur favoritt-leiklutin í kvøld, so skulu kyndilsmenn vera varnir við at undirmeta KÍF. Tað ásannaðu strandingar seinasta mikudag, tá hesir góvu STÍF ein skarpan gang, og taptu bara við einum máli á Skála.

Mansdystirnir í kvøld byrja klokkan 20.00.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VB	10	9	-	1	-	0	575	459	116	28
2 VÍF	10	7	-	2	-	1	515	424	91	24
3 Stjørnan	10	3	-	1	-	6	482	482	0	15
4 StÍF	9	4	-	1	-	4	489	517	-28	15
5 Kyndil	10	3	-	1	-	6	533	549	-16	13
6 Neistin	10	4	-	0	-	6	455	487	-32	13
7 Tjaldur	9	1	-	0	-	8	400	531	-131	3

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	11	8	-	0	-	3	722	608	114	25
2 StÍF	9	6	-	2	-	1	604	528	76	23
3 Kyndil	9	6	-	2	-	1	583	553	30	20
4 Neistin	10	4	-	1	-	5	619	593	26	18
5 KÍF	10	2	-	2	-	6	599	626	-27	11
6 H71	10	4	-	0	-	6	563	652	-89	11
7 Tjaldur	9	0	-	1	-	8	523	653	-130	4

Máltindarnir

Kvinnur

Daiva Tuomaite	VB	175	(48)
Asta Petrauskiene	StÍF	163	(41)
Danijela Ercevic	Stjørnan	162	(43)
Simona Dziugyte	Neistin	157	(54)
Sóley Mikkelsen	VÍF	146	(44)
Reda Kurkauskiene	VB	140	(19)
Lotte Sørensen	Kyndil	130	(64)
Milica Ergic	Tjaldur	122	(24)
Natasja Stamenkovic	Stjørnan	121	(9)
Lenka Ribaric	Tjaldur	112	(32)
Alina Olaru	StÍF	104	(8)
Jacklin Durhuus	VÍF	97	(9)
Nicoleta Radu	VÍF	89	(1)
Ileana Manolescu	Kyndil	88	(13)
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	71	

Menn

Dragisa Stojovic	Tjaldur	196	(20)
Damir Oros	KÍF	186	(41)
Áki Olsen	VÍF	149	(11)
Sveinur Justinussen	StÍF	147	(23)
Halgir D. Olesen	H71	143	(5)
Morgan Knezevic	Neistin	132	(28)
Ingi Olsen	VÍF	130	(28)
Jacob Jónsson	Kyndil	119	(7)
Áki Mørk	Neistin	116	(26)
Finnur Hansson	Kyndil	103	(13)
Costin Dumitrescu	StÍF	103	(22)
John Zachariasen	VÍF	98	
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	95	(27)
Niels Viggo Niclassen	H71	93	(1)
Petur Martin Poulsen	KÍF	91	

Todi vann á Jákupi

Báðir føroyingarnir vóru á vøllinum alla tíðina, táið FCK og Molde mánadagin spældu venjingardyst á Frederiksberg

ÚTISETAR
Jóannes Hansen

Nú var tað langt síðani, at teir báðir gomlu liðfelagarnir í KÍ, Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson, høvdu staðið andlit til andlit á vøllinum. Tað høvdu teir ikki gjørt, síðani Jákup Mikkelsen vardi Herfølge málið, og Todi var fastur maður í álopinum hjá FCK.

Men mánadagin spældu teir báðir aftur ímóti hvørjum øðrum. Molde hevur síðstu vikuna verið á venjingarlegu í Farum, og undan heimferðina vóru teir mánadagin á venjingarvøllinum hjá FCK á Frederiksberg.

Fleiri av spælarunum hjá FCK eru burturstaddir í landsliðsørindum. Millum hesar er Zuma. Peter Møller var smávegis skaddur, og so noyddust teir í FCK at biðja Toda spæla í álopinum saman við Jørgen Pettersson.

Jákup Mikkelsen hevur av og á í vár vart Molde málið. Sum vit hava skilt tað, so var ætlanin, at hin málverjin, Eddie Gustafsson, skuldi verja málið mánadagin. Men hann noyddist mánamorgunin at rýma úr venjingarleguni og heim til Svoríki, tí hann hevði fingið landsliðsboð. Orsøkin var tann, at svenski landsliðsmálverjin Andreas Isaksson varð skaddur undir venjing sunnudagin. Svoríki skal í morgin spæla EM undankappingardyst ímóti Ungarn.

Bara eitt mál

FCK vann dystin ímóti Molde 1–0. Málið fingu teir miðskeiðis í 1. hálvleiki. Carsten Fredgaard sendi frískark úr nítjan metrum upp um manngarðin og í málið uttan møguleika hjá Jákupi Mikkelsen.

FCK hevði ikki nógvar aðrar møguleikar. Todi varð spældur hampuliga leysur eina ferð, hann royndi at lyfta bóltin upp um Jákup, men bólturin fór út til málspark.

FCK hevði bóltin meiri enn gestirnir, men tað var Molde, sum hevði størstu málmøguleikarnar. Teimum eydnaðist kortini ikki at fáa mál, ikki minst tí FCK málverjin stóð seg væl.

Á heimasíðunum hjá Molde og FCK verður sagt, at tað sást væl, at FCK er komið longur í kappingarárinun. Teir hava spælt fleiri landskappingardystir, meðan Molde framvegis fyrireikar seg til fyrsta dystin. Molde spælararnir hava vant nógv síðstu vikuna, so teir vóru ikki heilt klárir at spæla poleraðan og skjótan fótbólt. Men teir søgdu seg vera nøgdar við venjingardystin. Tað vóru teir í FCK eisini, og teir løgdu afturat, at grasvøllurin var væl betri, enn tann í Bukarest var, sum danska landsliðið spældi á leygardagin.

Árliga fimleikaframsýningin hjá Havnar Fimleikafelg

Nú tað líður ímóti sumri, eru fimleikafeløgini kring landið so smátt farin at takka fyri í ár. Vanliga er stóri endabresturin árligu framsýningarnar, og í ár er onki undantak. Fyri viku síðan vístu fimleikararnir hjá Ljósinum fram, hvat tey hava fingist við í vetur, og leygardagin stóð Havnar Fimleikafelag fyri tørni.

Leygardagin vóru tað tey ungu í Havnar Fimleikafelag, sum sluppu at royna seg, og mánakvøldið vóru tað meira tilkomnu, sum sýndu fram.

Framsýningin endaðu við, at 5, 10 og 15 árs nálir vórðu handaðar og íðnaðarprógv til teir fimleikarar sum hava gjørt størst framstig í vetur.

-páll

Álvur er nýggjur kappingarleiðari

Landsliðsvenjarin fer at skipa fyri kappingunum í kvinnudeildini og í deildini fyri gentur 14–17 ár

KVINNUFÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Í vikuskiftinum vórðu fyrstu dystirnir í kvinnufótbólti í ár spældir. Talan var um fyrsta umfarið í steypakappingini ella áttanda parts finalurnar. HB vann 5–1 í Sumba, AB vann 1–0 á Sandi, GÍ vann á heimavølli 3–1 ímóti EB/Streymi, og dysturin millum B68 og FS Vágar varð útsettur. Hetta hevur við sær, at tað við undantaki av tí eina førinum er greitt, hvørji lið skulu hittast í fjórðingsfinaluni, sum verður næsta vikuskifti.

Fjórðingsfinalurnar eru sambært skránni hesar: HB–GÍ, KÍ–B68/FSV, AB–VB og B36–Skála. VB og Skála hava tikið síni lið úr kappingini. Tað vil siga, at AB og B36 eru longu komin í hálvfinaluna.

Størri áhugi

Álvur Hansen er nýggjur kappingarleiðari hjá kvinnunum. Umframt kvinnudeildini skal hann taka sær av gentum 14–17 ár. Frammanundan er Álvur Hansen venjari hjá landsliðnum, sum arbeiðir við at fyrireika seg til Oyggjaleikirnar í summar, og hann er eisini venjari hjá U–19 kvinnulandsliðnum, sum í heyst skal taka lut í EM undankappinarumfari.

Tá Álvur hevur havt og hevur so nógv við kvinnufótbóltin at gera, er einki at ivast í, at hann er tann, sum best hevur fingurin á pulsinum, og tað vil FSF nú fáa uppaftur størri nyttu burturúr. Álvur er ikki limur í kappingarnevndini, men hann verður kappingarleiðari fyri kappingarnevndina.

– Tað hevur verið tosað nógv um, at kvinnufótbólturin er í aldudali, og at tvey feløg longu hava tikið síni lið úr kappingini kundi bent á, at tað ikki stendur frægari til nú, enn tað hevur gjørt. Men eg haldi meg vita, at tey feløgini, sum nú eru tilmeldað, ætla at taka uppgávuna í álvara, og tað sær ikki so galið út, sigur Álvur Hansen.

Í FSF hava tey gjørt av, at kvinnukappingin skal vera í einari deild, har øll liðini skulu spæla á heimavølli og útivølli ímóti øllum. Tíggju feløg eruumboðað, og tað vil siga, at øll feløgini fara at spæla átjan dystir. Fyrsta umfarið í landskappingini hjá kvinnum verður longu annað vikuskifti.

Í gentudeildini er áhugin stórur. Í kappingini á heilum vølli eru tíggju lið meldað til, og í kappingini á hálvum vølli eru átta lið tilmeldað.

– Hetta er fyrsta árið, at tað verður roynt við gentukapping á hálvum vølli. Ynskið kom av, at tað í fleiri feløgum eru gentur, sum vilja sleppa at spæla fótbólt, men sum ikki sleppa upp í part, tí tað ikki eru nóg nógvar at manna lið við ellivu spælarum. Í fjør var samlaða talið á liðum í gentudeildini ellivu. Tá varð bara spælt á heilum vølli, og tað gekk ikki væl at fáa dystirnar avgreiddar. Men nú tykist síggja betri út, og tað eigur sjálvsagt at gera kappingina hugaligari, sigur Álvur Hansen.

Hóast tað seinnu árini hevur gingið striltið í kvinnufótbóltinum, táið tað hevur rátt um kappingarnar heima á landi, so ber ikki til at siga annað, enn at tað hevur hilnast væl, tá ið landsliðini hava roynt seg í altjóða kappingum. U–19 landsliðið stóð seg betri enn nakrantíð, tá ið tær í oktober vóru í Buglaria. Mótstøðuliðini vóru umframt Bulgaria Litava og Ongland. Føroyar megnaðu 1–1 ímóti vertunum, tær vunnu 2–0 a Litava, og Ongland vann 5–1 á Føroyum.

Kvinnulandsliðið skal í summar royna at verja gullkrónurnar, sum tær vunnu á Oyggjaleikunum fyri tveimum árum síðani.

Landliðsvenjarin hjá U19- og A-landsliðunum, Álvur Hansen, er nýggjur kappingarleiðari hjá kvinnun-um. Hann skal í framtíðini fyrireika kappingarnar hjá kvinnunum og gentum 14-17 ár.

Mynd: Savnsmynd